# Umfatandi kloakkarbeiði í Havn liðugt

**Hósdagin var lítil hátíðarløta í sambandi við, at kloakkskipanin á Skálatrøð var tikin í nýtslu.**

KLOAKKARBEIÐI



*Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd, tendrar fyri pumpustøðini, sum er endaliga staðfestingin av, at Tórshavnar kommuna hevur rokkið málinum at fáa Vestaruvág reina*

Forkvinnan í teknisku nevnd, Marin Katrina Frýdal, tendraði fyri pumpustøðini, sum var endaliga staðfestingin av, at Tórshavnar kommuna hevur rokkið málinum, ið var sett fyri mongum árum síðani, at fáa Vestaruvág reina.

Síðsti parturin av hesum stórarbeiði hevur gingið fyri seg á Skálatrøð, millum Torgið við Nólsoyar Páll og Bøgøtu og síðani fram við Rættará. Sostatt er langt um leingi komið á mál við arbeiðinum, ið varð sett í gongd aftur í 1996 og sum ymsir arbeiðstakarar hava tikið sær av. Saman við teknisku deild hjá kommununi hevur p/f Martin Leo verið ráðgevi og havt eftirlit við arbeiðinum.

Nú komið er mál við hesum partinum, eru tó framvegis stórar avbjóðingar fyri framman, og kommunan fer framhaldandi at virka fyri at betra um umhvørvið. Næsta innsatsøki verður at fáa betri skil á øll útlopini í kommununi, umframt at skifta út aðrar størri og smærri kloakkleiðingar út ymsastaðni í kommununi.

**Soleiðis hevur verið arbeitt**

- 1996: Partar av óskipaðu kloakkleiðingunum á økinum við Vesturkirkjuna oman ímóti V. U Hammershaimbsgøtu lagdar.
- 2002: Fyrsta projektætlan at umleggja allar kloakkleiðingar undir hugtakinum "Reinskan av Vestaruvág".
- 2003: Høvuðskloakkleiðing løgd frá økinum á Rasmusarbrúgv við Skinnarasker umvegis undir Bryggjubakka og Mylnugøtu niðan á Vaglið. Síðani varð bundið í Havnará. Kloakkarbeiði í Sigmundargøtu.
- 2004: Kloakkarbeiði í Grím Kambansgøtu.
- 2005: Høvuðskloakkleiðing løgd frá Steinatúni og úteftir móti J. Paturssonargøtu, niðan til Dalavegin.
- 2006: Høvuðskloakkleiðing løgd eftir J. Paturssonargøtu, frá Dalavegnum og út til Torfinsgøtu. Kloakkarbeiði gjørt í V. U. Hammershaimbsgøtu/ Grím Kambansgøtu.
- 2008: Pumpubrunnur lagdur á Skálatrøð, niðan fyri Smiðjuna í Lítluvík. Kloakk- og pumpuleiðing løgd heim í Vágsbotn.
- 2009: Kloakkleiðing løgd frá Rættará til pumpubrunnin við Bøgøtu og niðjasta part av Rættará. Pumpubrunnur settur upp Müllers Pakkhús.

## VEÐRIÐ




**Veðrið í morgin**
Andøvsgul upp í ein strúk av norðuri, í støðum upp í skrið. Um kvøldið snarar hann í landsynning og vindurin minkar. Um náttina niður í andøvsgul. Mest skýggað og til tíðir regn. Hitin verður um 4 stig




**Veðrið hósdagin**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi. Fyri smáskýggja, men út á dagin meiri skýggjað. Hitin um 4 stig. Um náttina gul til stívt andøvsgul av norðuri. Skýggja og kanska regna ella vátakavi. Hitin millum 0 og 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Gul til stívt andøvsgul av norði, sum út á dagin snarar í ein útsynning. Skýggjað og turt tað mesta av tíðini. Um náttina veksur hann vindin í stívt andøvsgul til strúk av norðuri. Skýggjað og regn, vátakavi ella kavi.Hitin verður millum 0 og 5 stig.

November var óvanliga lýggjur. Miðalhitin var 6,8°C, móti 4,9°C. Avfallið var 147 mm, miðal er 149 mm.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -16 |
| Nuuk | -10 |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 10 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 5 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 5 |
| Keypmannah. | 5 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | 3 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 47 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 15 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 4 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 10/12 kl. 06[00] – 11/12 06[00]. Hitin í gjár: 7,1°
Minsti hiti máldur í desember: -10,5° -
Mesti hiti máldur í desember: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 10/12 kl. 06[00] – 11/12 06[00].
Avfallið higartil í desember: 54 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

4. desember Mánin næstur jørðini
9. desember Seinna kvarter
16. desember Tendring
20. desember Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 15. des | 05:23 | 17:48 | 04:23 | 16:48 | 04:38 | 17:03 | 07:23 | 19:48 | 08:23 | 20:48 | 03:38 | 16:03 | 02:38 | 15:03 | 05:38 | 18:03 | 06:38 | 19:03 | 05:08 | 17:33 | 06:23 | 18:48 |
| 16. des | 06:13 | 18:39 | 05:13 | 17:39 | 05:28 | 17:54 | 08:13 | 20:39 | 09:13 | 21:39 | 04:28 | 16:54 | 03:28 | 15:54 | 06:28 | 18:54 | 07:28 | 19:54 | 05:58 | 18:24 | 07:13 | 19:39 |
| 17. des | 07:04 | 19:29 | 06:04 | 18:29 | 06:19 | 18:44 | 09:04 | 21:29 | 10:04 | 22:29 | 05:19 | 17:44 | 04:19 | 16:44 | 07:19 | 19:44 | 08:19 | 20:44 | 06:49 | 19:14 | 08:04 | 20:29 |
| 18. des | 07:52 | 20:16 | 06:52 | 19:16 | 07:07 | 19:31 | 09:52 | 22:16 | 10:52 | 23:16 | 06:07 | 18:31 | 05:07 | 17:31 | 08:07 | 20:31 | 09:07 | 21:31 | 07:37 | 20:01 | 08:52 | 21:16 |
| 19. des | 08:38 | 21:00 | 07:38 | 20:00 | 07:53 | 20:15 | 10:38 | 23:00 | 11:38 | - | 06:53 | 19:15 | 05:53 | 18:15 | 08:53 | 21:15 | 09:53 | 22:15 | 08:23 | 20:45 | 09:38 | 22:00 |




